

Desembur 2023

# Limabræv

starvsfelagið

Nr. 3/2023







## FIMTI HVØR LIMUR KENNIR SEG HAPPAÐAN

Vit hava seinastu tíðina sett sjóneykuna á happing á arbeiðsplássinum. Kanning vísir, at fimti hvør limur hevur upplivað happing seinasta árið.

LES UM KANNINGINA

## KEYPIORKAN ER FRAMVEGIS KROYST

Inflatiónin er framvegis høg, tó ikki so høg sum í 2022. Vit hava biðið fíggjarfrøðing greina, hvat hetta merkir fyri fríggjarviðurskiftini hjá okkara limum.

LES GREININGINA

## EINGIN LÆTTI TIL TEY, SUM TØRVA TAÐ MEST

Starvsfelagið hevur saman við Fakfelagssamstarvinum sent hoyringsskriv um ætlaðu skatta- og avgjaldsbroytingarnar hjá samgonguni.

LES HOYRINGSSKRIVIÐ

## SAMHUGAVERKFALLIÐ: ØLL FÁA ENDURRINDAÐ LØNARMISS

Starvsfelagið var eins og fleiri onnur fakfeløg í samhugaverkfall fríggjadagin 3. novembur 2023. Hetta var orsakað av politiska inntrivinum í verkfallið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum. Samhugaverkfallið var lýst fyri ein heilan dag, men var steðgað áðrenn tíð í Fasta Gerðarrætti. Les um dómin í Gerðarrættinum á leinkinum niðanfyri.

Allir limir, sum høvdu lønarmiss av verkfallinum, fáa endurrindað lønina, sum tey eru trekt fyri dagin. Set teg í samband við títt álitisfólk ella felagið, um tú ikki hevur fingið endurgjaldið.

LES UM GERÐARRÆTTARDÓMIN






# KRINGVARPIÐ: POLITISKA SKIPANIN MÁ GERA MEIRA

Kringvarp Føroya boðaði í farna mánaða frá, at vegna sparingar var ætlan at geva starvsfólkum uppsøgn og niðurseting av arbeiðstíð, umframt uppathald av avtalum við fríyrkisfólk. Hetta vóru uppsagnir, sum svara til 11 ársverk, góð 10% av samlaðu ársverkunum á stovninum.

Starvsfelagið fór alt fyri eitt í holtur við at svara ætlanarskrivunum saman við teimum, sum eru limir í felagnum. Eisini heittu vit á politisku skipanina at koma við eini bjarginarætlan til Kringvarpið, sum kann tryggja framtíðina á hesum stovninum, sum er so týdningarmikil fyri okkara talufrælsi og fólkaræði.

Aftursvarið frá Almanna- og mentamálaráðnum var at senda uppskot til hoyringar um eina prístalsjavning av kringvarpsgjaldinum. Hetta hevur fingið Kringvarpið at taka aftur ætlanirnar um uppsagnirnar, so øll starvsfólkini kunnu varðveita sítt starv sum frammaundan. Hetta fegnast vit sjálvandi um, men halda ikki, at hetta er eitt nóg gott inntriv, og at politiska skipanin eigur at gera meira.

Hetta hava vit skrivað í hoyringsskrivi til Almanna- og mentamálaráðið, ið kann lesast á leinkinum niðanfyri.

LES HOYRINGSSKRIVIÐ HER




# FORFÓLKAVAL FYRI FRAMMAN

Sambært viðtøkum felagsins skal forfólk veljast á komandi aðalfundi, sum verður 9. mars 2024.

Tey, sum ynskja at stilla upp, kunnu boða skrivstovu felagsins skrivliga frá. Eisini ber til at stilla annan lim upp.

Freistin at stilla upp er mánadagin 15. januar 2024. Les meira um forfólkavalið á heimasíðu felagsins.

LES UM FORFÓLKAVALIÐ

# VITJANIR Á ARBEIÐSPLÁSSUM HALDA FRAM

Starvsfelagið hevur seinasta hálvtannað árið verið á vitjanum á arbeiðsplássunum hjá limunum kring landið og í heyst hava vitjanirnar hildið fram.
Higartil í ár hevur felagið verið á vitjan á áleið 40 arbeiðsplássum.

Í heyst hava vit verið á arbeiðsplássum í Havn og í Suðuroynni. Eftir jól eru vitjanir í skránni á Sandoynni, umframt nakrar stovnar í Havn.

# LEIGUPRÍSIR HÆKKA 1. JANUAR 2024

Fyrst í komandi ári hækka leiguprísirnir á felagshølunum í Starvsfelagnum, auditorium í Smæruni og frítíðarhúsunum í Skálavík.

Bókingar, sum eru framdar áðrenn 1. januar 2024, hava nú verandi kostnað. Nýggju prísirnir kunnu síggjast á heimasíðuni.

SÍ PRÍSIRNAR



## HUGNAKVØLD OG SJAVSKAPPINGAR

Afturvendandi hugnakvøldið fyri limir, sum felagið skipar fyri á hvørjum ári, var í farna mánaða. Limirnir hava tikið væl ímóti hesum tiltakinum, sum var fult teknað aftur í ár.

Sum nakað nýtt hava vit í ár skipa fyri sjavskappingum, sum eisini hava verið væl vitjaðar. Seinna árliga sjavskappingin var í oktobur mánaða og tann næsta verður væntandi í januar.

## ÁLITISFÓLKAVAL OG -FUNDIR Í HEYST

Álitisfólkaval hevur verið í heyst, og hesa ferð eru áleið 20 nýggj álitisfólk ímillum tey áleið 100 álitisfólkini hjá felagnum.

Tveir spennandi álitisfólkafundir hava eisini verið í oktobur og novembur, har sjóneykan m.a. hevur verið sett á happing á arbeiðsplássinum, umhvørvið og grøna kósin, umframt førleikamenning á arbeiðsplássinum.

Vit takka øllum okkara álitisfólkum fyri teirra megnar arbeiðið og bjóða teimum nývaldu vælkomnum.






## VINNARI AV LUTAKASTINUM UM GÁVUKORT

Í samband við kanningina um happing, skipaði Starvsfelagið fyri lutakasti ímillum limir, sum svaraðu kanningini.

Vinnarin var kunngjørdur á álitisfólkafundinum í oktobur og gjørdist: Jórun Kruse.
Vinnarin hevur fingið boð frá felagnum.

## SKERD TELEFONAVGREIÐSLA Í DESEMBUR

Vegna serligar umstøður verður telefonavgreiðslan skerd í desembur mánaða. Telefontíðin verður í hesum tíðarskeiðnum týs- og hósdagar millum kl. 10 og 15.

Boð kunnu altíð sendast til starvsfelag@starvsfelag.fo og vit svara bert umvegis teldupost teir dagarnar, tá eingin telefonavgreiðsla er. Eru átrokandi boð, seta vit okkum í samband við teg sum skjótast.



# HEILSAN FRÁ FORMANNINUM




Nú stundar til jóla, árið 2023 lækkar ímóti endanum og skjótt bjóða vit 2024 vælkomið. Inniverandi ár hevur verið á tremur við bæði góðum og minni góðum hendingum. Úti í heimi, ikki so fjart frá okkum, er framvegis kríggj og óstabilitetur, og tað merkir okkum her heima við framhaldandi høgari inflatión og rentuhækkingum, sum hava rakt føroyska húsarhaldið meint.

Føroyski løntakarin er alsamt meira kroystur fíggjarliga, og tí liggur ein stór uppgáva fyri framman at tryggja okkara limum eina løn, sum ein kann liva av. Høga inflatiónin hevur gjørt, at flestu okkara seinastu árini hava havt eina reallønarlækking. Fakfeløg leggja nógv fyri at stríðast ímóti hesum, millum annað hava Felagið Føroyskir Sjúkrarøkarfrøðingar fyri kortum verið í drúgvum verkfalli, sum vit stuðlaðu teimum fult í. Vit vóru eisini í einum samhugaverkfalli í ein knappan arbeiðsdag sum mótmæli ímóti at løgtingið blandaði seg uppí sáttmálatrætuna og frælsa samráðingarrættin. Samhugaverkfallið varð tó avbrotið áðrenn tíð vegna ein gerðarrættardóm, sum tit kunnu lesa meira um her í limabrævinum.

Politiska aftursvarið við at leggja seg út í eitt verkfall og eisini ætlaðu umskipanina av skatti og brúkaragjøldum eru vit als ikki nøgd við. Ætlaðu umskipanirnar gera ikki nóg mikið fyri at tryggja løntakarum, serliga lágløntum, nakran lætta, sum veruliga munar. Hetta hava vit saman við Fakfelagssamstarvinum víst á í hoyringssvari til Fíggjarnevnd Løgtingsins. Hoyringssvarið síggja tit eisini her í limabrævinum.

Eitt annað mál hjá okkum hevur verið í Kringvarpi Føroya, har áleið 10% av starvsfólkunum í farna mánaða fingu ætlanarskriv um uppsøgn ella ætlan um lækkaðan starvsbrøk vegna sparingar. Vit hava heitt á politisku skipanina um at koma við eini bjargingarætlan til Kringvarpið, og eftir at eitt uppskot um prístalsjavning av kringvarpsgjaldinum er sent til hoyringar, hevur leiðslan tikið ætlanarskrivini aftur. Hetta merkir, at starvsfókini varveita størv síni sum frammanundan og uttan broytingar. Hóast eg fegnist um at størvini eru varðveitt, haldi eg tó ikki, at prístalsjavning av kringvarpsgjaldinum er nóg mikið at tryggja haldføri hjá stovninum og at fleiri átøk mugu gerast fyri Kringvarpið. Hetta kunnu tit eisini lesa meira um í limabrævinum.

Eitt av fleiri átøkum hjá okkum í ár snúði seg um eina stóra kanning um happing á arbeiðsplássinum. Úrslitið av kanningini vísti, at fimti hvør limur í felagnum hevur kent seg happaða/n seinasta árið, og hetta eri eg snøgt sagt skelkaður av. Tað liggur eitt stórt arbeiði fyri framman fyri at basa happingini, serliga liggur ábyrgdin hjá leiðslunum og hjá eftirlitismyndugleikanum, sum er Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, men vit sum fakfelag og sáttmálapartarnir mugu eisini taka hetta í allar størsta álvara. Vit sleppa ikki hesum álvarsmáli her og tí hava vit seinastu tíðina verið úti á nógvum arbeiðsplássum og hjá sáttmálapørtunum og lagt úrslitið av kanningini fram. Vit eru fegin um góðu móttøkuna og viljan at loysa trupulleikan. Frameftir fara vit eisini at taka evnið upp regluliga og gera eina nýggja kanning um tvey ár fyri at fylgja gongdini.

At enda vil eg ynskja øllum limum við familju, sáttmálapørtum og samstarvsfeløgum eini gleðilig jól og gott nýggjár. Takk fyri tað brátt farna árið og takk fyri tykkara dygga stuðul til felagið.

## STARVSFELAGIÐ FER Í JÓLAFRÍ

Skrivstova felagsins verður stongd um jólini og nýggjárið, meðan vit í umsitingini halda jólafrí.

Skrivstovan letur aftur hósdagin 21. desembur kl. 16 og letur upp aftur mikumorgunin 3. januar kl. 9.

Í jólafrítíðini svarar telefonin ikki, men eru átrokandi boð, ber til at skriva til starvsfelag@starvsfelag.fo og vit venda aftur sum skjótast.

starvsfelagið

